# GRØNA LEIÐIN

Umhvørvispolitikkur fyri Tórshavnar kommunu





Útgevari: Tórshavnar kommuna 2016
Tekningar: Gunn Sloan Müller
Uppseting: Janus Kampman / Føroyaprent
Prent: Føroyaprent

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# INNIHALDSYVIRLIT


Umhvørvið í Tórshavnar kommunu . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 4

Umhvørvispolitikkur hjá Tórshavnar kommunu . . . . . . . . . . . . . . 7

Búskaparligar raðfestingar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10

Varandi orka . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 12

Minni burturkast, meiri endurnýtlsa . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14

Okkara náttúra. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 16

Kommunan tekur ábyrgd . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 18




# UMHVØRVIÐ
# Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU

## Grøna skjalið – Agenda 21

Tórshavnar kommuna hevur bundið seg til at taka umhvørvið við í øllum virksemi. Í 2009 samtykti býráðið Grøna skjalið, sum var partur av Lokal Agenda 21. Við støði í hesum skjali arbeiðir kommunan støðugt við burðardyggari samfelagsmenning, sum tryggjar lívsgrundarlag og góðsku fyri núlivandi og komandi ættarliði.

## Veðurlagsráðstevnan COP21

Í samband við altjóða veðurlagsráðstevnuna COP21, sum var hildin í Paris í desember 2015, undirskrivaðu borgarstjórar í norðurlendskum høvuðsstøðum eina yvirlýsing um veðurlagsbroytingar – 'Nordic Capitals' Declaration on Climate Change'. Norðurlendsku høvuðsstaðirnir eru sinnaðir at ganga á odda móti veðurlagsbroytingum og taka tøk til tess at venda gongdini og tálma alheimsupphitingini. Tórshavnar kommuna leggur tí dent á nýhugsandi býarplanlegging, at hava fyrilit fyri lívfrøðiligum margfeldi í býunum, at nýta nýhugsandi loysnir at skerja útlátið av vakstrarhúsgassi og alsamt nýta meiri varandi orku.

## Vit gera mun!

Millum umhvørvisvinarlig tiltøk og grønar loysnir í Tórshavnar kommunu er eitt nú ókeypis bussleiðin. Endamálið við ókeypis bussleiðini er at fáa fleiri fólk at brúka buss og soleiðis minka bilferðsluna.

Somuleiðis arbeiðir kommunan áhaldandi við at betra umstøður hjá bleytu ferðsluni, t.e. at gera gongubreytir og súkklubreytir, so tað er trygt hjá fólki at flyta seg á annan hátt enn í bili.

Kommunan hevur gjørt íløgu í stýriskipanir til gøtuljós, sum gera tað møguligt at stilla og fjarstýra gøtuljósini eftir árstíð og øðrum viðurskiftum, og á tann hátt minka orkunýtsluna. Alsamt fleiri gøtuljós hava eisini orkusparandi LED-perur.

VIT GERA MUN
- Ókeypis bussleið
- Fleiri gongu- og súkklubreytir
- LED gøtuljós

Ymisk orkusparandi átøk verða gjørd, tá ið bygningar hjá kommununi verða umvældir, og tá ið nýtt verður bygt. Fyri at gera verandi bygningar meiri orkusparandi verður eitt nú bjálvað betur, og ymiskar orkusparandi skipanir verða nýttar. Fleiri nýggir bygningar hjá kommununi nýta somuleiðis grønar orkuloysnir til upphiting, t.e. sjóhita og jarðhita. Fleiri sethúsaøki nýta fjarhita, og ætlanin er at útbyggja og knýta fleiri øki í fjarhitaskipanina, m.a. ítróttarøkið í Gundadali.

Á hvørjum ári skipar kommunan fyri ymiskum átøkum og tiltøkum við tí endamáli at upplýsa og broyta hugburð. Millum hesi kunnu nevnast árliga Umhvøvisvikan og Earth Hour. Harafturat hevur Tórshavnar kommuna í mong ár veitt stuðul til umhvørvisvinarligar verkætlanir.

Sum framhald av hesum umhvørvisarbeiði hevur Tórshavnar kommuna tí tikið stig til at orða ein umhvørvispolitikk.

# UMHVØRVISPOLITIKKUR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU

Umhvørvið hevur seinnu árini fingið størri týdning og áhuga hjá tí einstaka og í samfelagnum sum heild. Til tess at fáa sum best burtur úr ríku náttúruni og skapa varandi karmar um ein tryggan búskap er neyðugt at endurnýggja bygnaðir, sum hava havt stóra ávirkan á, hvussu samfelagið er vorðið skipað.



Í framtíðini skal alt virksemi taka støði í umhvørvinum. Tilknýtið millum menniskju og náttúruna skal verða viðurkent, og vit skulu virka í náttúruni við virðing fyri teimum ómetaliga týdningarmiklu vistskipanum, sum hava ment seg gjøgnum øldir og hýsa øllum lívi. Tórshavnar kommuna fer at slóða fyri einum grønum og burðardyggum samfelag soleiðis, at borgarar í kommununi verða fyrimyndir hjá øðrum heimsborgarum.

Umhvørvispolitikkurin er úrslit av einum víðfevndum arbeiði, sum byrjaði í februar 2015. Politikarar, umsiting, serkøn, borgarar og áhugabólkar hava verið partur av tilgongdini, og ætlanin er, at grøna visjónin í umhvørvispolitikkinum skal seyra út í alt samfelagið.




## Umhvørvispolitikkurin er skipaður í fýra øki

Varandi orka snýr seg um útlát av vakstrarhúsgassi, Minni burturkast, meiri endurnýtsla um tilfeingisnýtslu, Okkara náttúra um dálking og grønt virksemi og Kommunan tekur ábyrgd um, hvussu umhvørvisatlit gerast partur av virkseminum hjá kommununi og tess stovnum. Til hvørt øki hoyra tvey mál.

## Endamál við umhvørvispolitikkinum

Umhvørvispolitikkurin er eitt stýriamboð til at fyribyrgja útláti, burturkasti og dálking.

Grundleggjandi fyri umhvørvispolitikkin er visjónin um, at komandi ættarlið skulu hava somu møguleikar at gagnnýta náttúruna sum undanfarin ættarlið. Eitt fjølbroytt plantu- og djóralív, sum skapar mótstøðuførar vistskipanir og tryggjar øllum atgongd til tilfeingi, er grundvøllurin undir umhvørvispolitikkinum.

**VIT FYRIBYRGJA**

- Útláti
- Burturkasti
- Dálking

Eftir ætlanum og politikki, sum mynda virksemið í Tórshavnar kommunu, skulu ásetingarnar í umhvørvispolitikkinum takast stigi víðari. Umhvørvispolitikkurin fær sostatt týdning fyri kommunuætlanina, grønu ætlanina, gulu ætlanina, bláu ætlanina, svørtu ætlanina, ferðslutrygdarætlanina, parkeringspolitikkin, innkeypspolitikkin, orkupolitikkin og hitaætlanina.

Úti í heimi virka onnur eisini fyri grønum broytingum. Royndir okkara hava tí týdning fyri fólk aðrastaðni og kunnu tí somuleiðis geva býum og bygdum úti í heimi íblástur.

## Útinnan

Býráðið, politisku nevndirnar og umsitingin í Tórshavnar kommunu hava ábyrgd av at útinna umhvørvispolitikkin. Umráðandi er at skapa røttu karmarnar, so at fólk í Tórshavnar kommunu hava møguleika at liva og virka burðardygt.

Øll, sum búgva og virka í Tórshavnar kommunu, eru við til at stuðla einum burðardyggum lívsstíli. Allir skúlar, dagstovnar, øll grannaløg, feløg og arbeiðspláss skulu verða eggjað at taka stig til ymisk átøk.

## Eftirmeting

Annaðhvørt ár verður frágreiðing gjørd, sum lýsir gongdina í málunum í umhvørvispolitikkinum. Átøk, sum hava týdning fyri tey 8 málini, verða greinað, og hagtøl verða brúkt til at geva ábendingar um gongdina.



Umhvørvispolitikkurin verður endurskoðaður við 6 ára millumbili. Ein eftirmeting verður gjørd av málunum í undanfarna umhvørvispolitikki, har staðfest verður, hvussu málini hava hilnast, og um nýggj mál skulu verða sett.



# BÚSKAPARLIGAR RAÐFESTINGAR

Raðfesting av umhvørvinum er eisini ein búskaparlig raðfesting. Vistskipanir veita ørgrynni av ókeypis tænastum, sum tryggja mat og vælveru. Í Føroyum fáa vit ágóðan av spískamarinum í havinum og grøðini á landi. Hetta er partur av grundarlagnum undir okkara vælferð. Vantandi heildarhugsan og umhvørvisatlit í samfelagsvirksemi elvir til afturstig í heilsu og trivnaði, sum eisini endurspeglast í fíggjarligum viðurskiftum. Tí er umráðandi at gevast at dálka náttúruna og í staðin fjálga um okkara tilfeingi.





Broytingar í veðurlagi órógva vistskipanir og samfeløg í øllum heiminum. Tess meiri alheims miðalhitin hækkar, tess størri gerst búskaparligi kostnaðurin hjá býum og bygdum kring heimin. Íløgur í skipanir, sum gera Føroyar meiri sjálvberandi við til dømis varandi orku og sum gera tað møguligt at gagnnýta alt tað tilfeingi, sum er í Føroyum, kunnu minka um alheims útlátið av vakstrarhúsgassi og samstundis styrkja føroyska búskapin.



# VARANDI ORKA

Koltvísúrni í luftini er vaksið 40 prosent, síðani ídningin tók dik á seg. Økta innihaldið av koltvísúrni í luftini er mannaskapt og stendst fyri ein stóran part av øktari olju-, kol- og gassnýtslu. Henda nýtsla elvir til veðurlagsbroytingar, sum skapa órógv og hótta støðufestið hjá búskapi og vistskipanum.

Seinastu árini eru 220 túsund tons av olju seld árliga í Føroyum. Oljan verður fyri tað mesta brúkt til skip, húsarhald, akfør og streymframleiðslu. Harumframt verða fossil brennievni eisini nýtt í framleiðslu og flutningi av ymiskum vørum, sum verða fluttar til Føroya.

Altjóða semja er um, at alheims miðalhitin ikki skal fara upp um 2 hitastig, samanborið við støðuna fyri ídningina. Tað merkir, at útlátið av vakstrarhúsgassi skal minka munandi, og at neyðugt er við broytingum í lívshátti og nýtslu av grønari tøkni. Fossilar orkukeldur eiga ikki at verða nýttar. Í staðin skal orka koma frá varandi orkukeldum sum sólini, vindi, vatni og jarðarhita.



## MÁL 1

## ALLUR HITI OG STREYMUR KEMUR FRÁ VARANDI ORKU Í 2030

- Fjølbroytt nýtsla av varandi orkukeldum og tilvitan verður skapt um orkunýtslu og orkusparing.
- Bygningar verða bygdir, bjálvaðir og skipaðir við atliti at lágari orkunýtslu.
- Grøna orkan frá vindi og vatni verður gagnnýtt mest møguligt.
- Fjarhitanetið verður útbygt. Varandi orkukeldur verða brúktar í fjarhitaframleiðslu.
- Akfør skulu vera umhvørvisvinarlig, og løðistøðir til el-bilar skulu vera, har nógv fólk koma.

## MÁL 2

## TVÍFALT SO NÓGV GANGA ELLA SÚKKLA Í 2020 Í MUN TIL 2016

- Tað skal vera lætt at vera virkin og taka lut í samfelagnum uttan at brúka bil.
- Fleiri fólk skulu brúka bussleiðina.
- Blandað ferðsla og smalir vegir skulu økja um eftiransnið í ferðsluni. Børn í skúlaaldri skulu kunna vera í ferðsluni sjálv.
- Pláss skal vera at seta súkkluna frá sær, har nógv fólk koma, til dømis við skúlar, dagstovnar, handlar, bókasøvn, sjúkrahús, eldrabýli og mentanarhús.

# MINNI BURTURKAST, MEIRI ENDURNÝTSLA

Verandi nýtsla er stór og elvir m.a. til einsháttað jarðarbrúk, og at tilfeingið verður troytt ov ógvusliga. Harumframt verða fossil brennievni í flestum førum brúkt í framleiðslu, og sosial og etisk atlit fylla ikki altíð nóg nógv. Grundleggjandi broytingar í framleiðslu og nýtslu skulu gerast fyri at tryggja burðardyggan livihátt.

Til tess at minka um nøgdina av burturkasti er skilagott, at fleiri fáa ágóðan av somu lutum við skipanum, ið gera tað møguligt at skiftast um og leiga lutir. Eisini skulu brúkslutir hava langa livitíð og verða umvældir ella endurvunnir.



Lutir, sum ikki eru kunnu endurnýtast, kunnu vera til ampa fyri umhvørvið, og tí hevur tað týdning, at atlit verða tikin at tilfarinum, sum vørur eru gjørdar úr. Lívrunnið tilfar verður niðurbrotið í eini vistfrøðiligari skipan. Men plast verður ikki niðurbrotið í náttúruni og hvørvur tí ikki.

MÁL 3

## BURTURKASTIÐ SKAL MINKA, OG ENDURNÝTSLAN AV BURTURKASTI SKAL VAKSA VIÐ 30% Í 2030 SAMANBORIÐ VIÐ 2016

- Sankutøðframleiðsla skal vaksa og víst verður á, hvussu lívrunnið tilfar kann verða nýtt.
- Økt umvæling, endurnýtsla og endurframleiðsla. Umstøður fyri handverki og skapandi virksemi.
- Plastnýtslan verður skerd.

MÁL 4

## VARÐVEITA TILFEINGIÐ Í RINGRÁS

- Íløt skulu endurnýtast. Framleiðarar, veitarar og brúkarar hava ábyrgd av støðugt at hava íløt í umfari.
- Nýtslan av evnafrøðiligum evnum og vørum, sum innihalda evnafrøðilig evni, verður skerd.
- Økt sínámillum býtisnýtsla, t.d. av amboðum, klæðum, bilum, súkklum og elektriskari útgerð.
- Byggitilfar skal endurnýtast.

# OKKARA NÁTTÚRA

Náttúran er pallur okkara og veitir vakstrarlíkindi fyri allari vælferð, tí hevur eitt heilsugott umhvørvi alstóran týdning.

Framleiðslan av evnafrøðiligum evnum er økt nógv seinastu árini, og hetta hevur við sær, at stórar nøgdir av heilsuskaðiligum evnum eru í djórum og menniskjum – bæði í býum, bygdum og í natúrligum umhvørvi. Evnafrøðilig evni verða nýtt í framleiðsluni av bæði mati og ymsum nýtslulutum, og umhvørvisárin verða ofta ávíst ov seint, og ikki fyrr enn umhvørvið longu er dálkað, og heilsuárin eru vorðin staðfest.

Tilvit er avgerandi fyri, at stóra nýtslan av evnafrøðiligum evnum verður tillagað. Vitan um, hvussu matur og annað er fingið til vega, og tað at vera við í hesum arbeiði gevur tí einstaka virðismikið innlit og førleikar til at meta um umhvørvisvandar. Verður lagt væl til rættis, ber til at vera meiri sjálvberandi við mati, klæðum og øðrum.

Ein burðardygg mentan er grundað á arbeiði, ítriv og samveru, sum ikki dálkar ella tærir av náttúrutilfeinginum. Náttúran er ikki bara ein sýnisgluggi, men hevur stóran samfelagsligan týdning. Vøkstur og trø skapa trivnað, geva kunnleika um vistskipanir, binda koltvísúrni og virka við til eina ørgrynni av øðrum ágóðum. Náttúran er rótgrógvin partur av lívinum í býi og bygdum í Tórshavnar kommunu, og virksemi, sum tekur støði í natúrliga umhvørvinum, er við til at menna fatanina, hví náttúran hevur týdning.



## MÁL 5

## UMHVØRVIÐ VERÐUR IKKI DÁLKAÐ

- Sjógvurin skal vera nóg reinur at svimja í, og matur úr havinum skal ikki vera heilsuskaðiligur. Neilig árin á lívið í sjónum og við sjóvarmálan skulu ikki standast av spillivatni, aling, skipaferðslu ella øðrum virksemi.
- Tilfar, sum verður lagt á lendi, skal ikki geva frá sær evni, sum eru skaðilig fyri heilsu og umhvørvi.
- Luftin skal vera rein. Fleiri umhvørvisvinarligar bilar, og bilar skulu ikki nýta píkadekk.

## MÁL 6

## MEIRI GRØNT VIRKSEMI

- Kommunan virkar fyri einum grønum býar- og bygdarumhvørvi, har trø og øki við uppruna-ligum plantuvøkstri skulu varðveitast.
- Møguleikar skulu vera hjá fólki sjálv at skaffa sær mat. Umstøður skulu vera til urtagarðsvirksemi og velting. Traðir skulu vera í nýtslu.
- Nýtslan av almenna rúminum verður meir fjøltáttað. Vegir og parkeringsøki kunnu verða brúkt til ymiskt hissini virksemi, so sum spæl, prát, ítriv og ítrótt.
- Trivnaður og heilsa verða raðfest hægri við at skapa karmar fyri, at fólk kunnu vera meiri saman úti í náttúruni um ymiskt.



# KOMMUNAN TEKUR ÁBYRGD

Kommunan minkar um útlát, burturkast og dálking við íløgum sínum. Tí skulu avgerðir verða tiknar við støði í eini heildarmeting, sum fram um alt fatar um umhvørvislig og sosial atlit. Nýhugsan er neyðug fyri at tryggja, at virðismikið tilfeingi ikki verður brúkt og síðan burturbeint.

2000 arbeiðspláss eru beinleiðis knýtt at Tórshavnar kommunu. Starvsfólk, sum hava sína gongd á eitt nú barnagarði, eldrasambýli, skrivstovu ella uttandura, duga væl at meta um, hvussu uppgávur í teirra dagliga virki eiga at vera loystar. Tí hevur tað týdning, at einstøku arbeiðsplássini sjálv eru við til at seta í verk grøn átøk.







## MÁL 7

## ÚTLÁTIÐ AV VAKSTRARHÚSGASSI SKAL VERA 50% LÆGRI Í 2025 SAMANBORIÐ VIÐ 2016

- Íløgur verða gjørdar í upphitingarskipanir við varandi orkukeldum.
- Orkusparandi sniðgeving og innrættan av bygningum.
- Á kommunalum arbeiðsplássum skal siðvenja vera at brúka hita og streym við skili.
- Akfør skulu vera umhvørvisvinarlig. Starvsfólk skulu kunna súkkla í arbeiðsørindum.

## MÁL 8

## HÓVLIG OG BURÐARDYGG NÝTSLA



- Kommunan orðar ein grønan innkeypspolitikk. Í sambandi við vøruval, skal atlit takast til lívsringrásina hjá vørum, í hesum sambandi m.a. orkunýtslu, tilfarsnýtslu og nýtslu av evnafrøðiligum evnum. Lokalt endurnýtslutilfar verður raðfest frammarlaga.
- Matur á kommunalum stovnum og arbeiðsplássum skal vera vistfrøðiligur.
- Minni burturkast. Gamalt innbúgv skal verða brúkt í endurnýtslu ella nýframleiðslu. Lívrunnið burturkast verður skilt til djóraføði og sankutøð. Asfalt, betong og glas skal endurnýtast.
- Tað skal vera lætt hjá starvsfólki at ganga, súkkla ella taka buss til arbeiðis.



TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

FØROYAPRENT I SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705